# Steypafinalan flutt til Klaksvíkar




*Fyri fyrstu ferð nakrantíð, skal Føroya Løgmaður ikki handa Løgmanssteypið í Havn, men ístaðin í Klaksvík.*
Mynd: Álvur Haraldsen

**LØGMANSSTEYPIÐ** FSF boðaði í gjár frá, at finalan í kappingini um Løgmanssteypið verður leikt í Klaksvík á Summarfestivalinum í ár

Tróndur Arge

– Seinastu árini hevur steypafinalan verið leikt á ovara vølli í Gundadali, men tað er nú søga. Eitt av høvðusstríðsmálinum hevur verið kostnaðurin, ið Tórshavnar Kommuna hevur kravt afturfyri at steypafinalan verður leikt á Ólavsøku. Tann kostnaður liggur á 100.000 kr. Hetta hevur FSF ikki vilja góðtikið og tá Klaksvíkar Kommuna so bjóðaði seg fram, tók FSF av tí møguleikanum heldur.

Semja er gjørd við fyrireikararnar av Summarfestivalinum um, at einki tónleikatiltak verður, meðan finalan verður leikt.

Eftir samráðingar við Klaksvíkar Kommunu mælti ein samd kappingarnevd til, at finalan verður leikt í Klaksvík á Summarfestivalinum.

Í gjór tók so starvsnevndin hjá FSF undir við tilmælinum.



*Klaksvíkin verður í ár karmur um steypafinaluna.*
Mynd: savnsmynd

Eftir eina roynd at spæla finaluna um Løgmanssteypið á Tórsvølli í nøkur ár, valdi FSF aftur at flyta hana á ovara í Gundadali. Eisini tíðspunktið á finaluni hevur skift, men í fjør var hon leit á Ólavsøku fyri einum fullsettum Gundadali.

Sostatt verður finalan um Løgmanssteypið leikt fríggjakvøldið 6. august klokkan 18.00 í Klaksvík.

trondur@sosialurin.fo

# Veddingin gav átta milliónir

**VEDDING** So mikið var í Føroyum spælt við í spølunum hjá Danske Spil í fjør, at Ítróttavedding í farnu viku kundi lata føroyskum barna- og ungdómsarbeiði tilsamans 8,1 millión krónur




*Trygvi Bech Árting frá Føroya Ungdómsráði, Petur Elias Petersen frá Ítróttasambandi Føroya og Jørgen Meitilberg frá Føroya landsstýri við tilsamans 8,1 millión krónum í føvninginum*
Mynd: Hilmar Jan Hansen

Hilmar Jan Hansen

Í farnu viku hevði smápartafelagið Ítróttavedding aðalfund, og tá blivu tilsamans 8,1 milliónir krónur býttar út til eigararnar av Ítróttavedding, landsstýri fingu 1.620.000 krónur í part. Upphæddin skiftir eitt sindur frá einum ári til annað, alt eftir hvussu nógv verður spælt í Føroyum, og hesar átta milliónirnar vóru umleið sama upphædd sum

**» Upphæddin skiftir eitt sindur, alt eftir hvussu nógv verður spælt, og hesar átta milliónirnar vóru umleið sama upphædd sum tey seinnu árini**

sum eru Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Føroya landsstýri. Hetta er tann parturin av veddingarpengunum, sum á hvørjum ári kemur barna- og ungdómsarbeiði í Føroyum til góðar.

Hesa ferð fekk Ítróttasamband Føroya 4.861.000 krónur og Føroya Ungdómsráð og Føroya landsstýri fingu 1.620.000 krónur í part. Upphæddin skiftir eitt sindur frá einum ári til annað, alt eftir hvussu nógv verður spælt í Føroyum, og hesar átta milliónirnar vóru umleið sama upphædd sum tey seinnu árini.

Hesi 13 árini, síðani smápartafelagið Ítróttavedding og Danske Spil fóru undir samstarvið, eru yvir 90 milliónir krónur av veddingarpengum komnir aftur til Føroya sum eitt gott íkast til barna- og ungdómsarbeiði.

hilmarjan@sosialurin.fo